

# Ov nógvir sviku

**Tá einir seks-sjey av okkara monnum spæla langt undir tað, sum teir vanliga plaga at standa fyri, so kann tað ikki blíva nóg gott. Úrslitið av dystinum staðfesti eisini hetta, og leikaraummælini verða ikki heilt so positiv, sum tey onkra aðru ferðina hava verið**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*

### 1. Jens Martin Knudsen, NSÍ (63 dystir/0 mál)
Varð tikin fram um Jákup Mikkelsen hesaferð, men tóktist als ikki so sannførandi, sum hann ofta hevur verið. Hevði óhpenar leiklutir í fleiri av sveisisku málunum, tó at hann eisini hevði onkra kanón-bjarging. Megnaði samanlagt ikki at sannføra um, at hann eigur at vera fremsta valið á plássinum.

### 2. Súni Olsen, GÍ (15/1)
Av føroysku verjuleikarunum var Súni avgjørt tann, sum átti størstu æruna av dystinum. Hevði fyri tað allar mesta gott tak í síni síðu, og tá 4-0 málið kom hansara meðna, var hetta orsakað av býttisligum bólttapi á miðjuni. Sýndi eisini sannan stríðsvilja í seinna hálvleiki. Ikki minst, tá hann á ótrúligan hátt forðaði einum 7-0 máli, eftir sveisisk kontra, sum kom eftir føroyskt hornaspark, ið Súni sjálvur tók.

### 3. Óli Johannesen, TB (67/1)
Var heldur ikki ein av monnunum, sum tóktist vera á toppinum. Tóktist beinleiðis tungur í fleiri førum, og við okkurt av málunum sá tað eitt sindur løgið út, at føroyska liðið royndi at trekkja off-side, uttan at trýst varð lagt á bólthaldaran. Fekk í ølllum førum ikki beint ivan um sítt pláss burtur, men royndirnar gera uttan iva, at eisini er partur av miðverjuni mikudagin.

### 4. Pól Thorsteinsson, B36 (34/0)
Vanliga so tryggi bakkurin hevði helst sín vánaligasta landsdyst nakran tíð. Evnini at standa rætt og lesa spælið rætt tóktust vera púrasta horvin, og ferð eftir ferð varð hann yvirspældur í sínari síðu, har sveisarar til tíðir høvdu eina heila autostradu at koyra álopsspælið eftir. Varð seinasta hálva tíman darvaður av einum haldi í nakkanum, men slapp ikki út, tá allar útskiftingar vóru nýttar.

### 5. Jón Rói Jacobsen, Frem (17/0)
Tykist enn ikki hava funnið sama støðið, sum hann hevði undan skaðasteðginum. Sá í fleiri førum tungur út, men tað hongur helst eisini saman við, at kroppurin aftur skal venja seg til dyst hvørt vikuskifti. Tað er tó einki at ivast í, at hann eisini heldur fast um plássið. Snøgt sagt tí evnini eru so nógv betri, enn hjá nøkrum øðrum alternativi til plássið.

### 6. Claus Bech Jørgensen, Coventry (1/0)
Kundi fingið eina dreymabyrjan, tá hann tók sær av frísparkinum í fimm-metrinum, men ístaðin var hetta byrjanin til endan hjá føroyska liðnum. Nýggi maðurin var tó avgjørt ein av teimum, sum slapp hampuliga væl frá dystinum. Arbeiddi væl, og sýndi góðan bóltførleika, eins og hann eisini hevði einstakar góðar gjøgnumbrotsroyndir.

### 7. Fróði Benjaminsen, Fram (27/2)
Skuldi enn einaferð vera maðurin, sum skipaði føroyska spælið, og hetta kom hann hampuliga væl frá. Uppgávan gjørdist trupul, tá so fáar flytingar vóru á føroyska liðnum, men Fróði megnaði í nógvum førum at halda bóltinum væl, áðrenn hann við umhugsni sendi víðari. Megnaði tó ikki einsamallur at lyfta samlaða liðavrikið, men tann partin kann toftamaðurin ikki lastast fyri.

### 8. Julian Johnsson, ÍA (57/4)
Motorurin á føroyska miðvøllinum tóktist ongantíð veruliga at koma fyri seg. Nógvi hitin kostaði helst eisini eyka nógv hjá einum leikara, sum í so stóran mun hevur rennipensumið sum avgjørdi styrki sína. Tí sóu vit heldur ikki vanliga raidini, sum plaga at koma seinasta tíma, og sum heild avdúkaði dysturin í ov stóran mun, at tekniski førleikin er avmarkaður.

### 9. Jákup á Borg, HB (34/2)
Tykist í løtuni ikki at hava somu gjøgnumbrotsstyrkina, sum í seinastu undankapping var við til at skapa so nógv føroysk mál. Megnaði eisini í ov lítlan mun at koma við í føroyska spælið, og útskiftingin var kanska náttúrlig, tá venjararnir valdu at royna aðrar miðvallarsamansetingar seinastu løtuna.

### 10. John Petersen, B36 (54/6)
Skálamaðurin var fyri nógvum ákoyringum eftir dystin seinast, og hann megnaði ikki at tippa allar hesar. Tykist ikki longur at vera eins væl førur fyri at átaka sær leiklutin sum framrættaði spælskiparin á liðnum, soleiðis sum hann so ofta hevur verið tað fyrr.

### 11. Jónhard Frederiksberg, Skála (4/0)
Var nakað óvæntað settur sum fremsti maðurin á liðnum, og tó at hetta ikki gav mál, so prógvaði Jónhard í ávísam mun sítt virði. Tóktist fyri tað nógv at renna rætt, soleiðis at kreftirnar vórðu nýttar við umhugsni, heldur enn at renna seg upp í skúm. Skal nakað takast frá honum, so er tað helst, at hann enn ikki tykist hava nóg stóra gjøgnumbrotsstyrki, men hann hevur ferðina, sum eigur at gera hetta gjørligt.

### 12. Rógvi Jacobsen, HB (27/4)
Varð offraður, tá rúm skuldi gerast fyri Claus Bech Jørgensen á miðvøllinum. Fekk tó seinastu 35 minuttirnar á álopsplássinum, og hann nýtti hesa løtuna til at prógva, at hann væl kann gerast føroyska fremsta valið á plássinum. Sýndi vilja í spælinum, og helt tað samstundis á tí einfalda støðinum, og stóri spurningurin til mikudagin er helst, um hetta var nóg mikið til at vinna honum fremsta plássið her, ella um venjararnhir framvegis halda fast um royndirnar hjá John Petersen.

### 13. Johan Byrial Hansen, AC Horsens (11/0)
Fekk seinastu 20 minuttirnar á vøllinum, og stóð seg sum so hampuliga væl. Hugsaði fyrst og fremst um verjuskyldurnar, og fekk eisini tipt annars víðopnu høgru síðuna hjá okkum. Saman um tikið var grundarlagið tó ov tunt, til at nøkur verulig meting kann gerast.

### 18. Atli Danielsen, KÍ (5/0)
Fekk seinasta hálva tíman á miðvøllinum, og kom sum so hampuliga væl frá uppgávuni. Hesa løtuna tóktust sveisarar tó hava skift gear niðureftir, men Atli sýndi umhugsni og nærlagna í sínum spæli. Hevur eisini tann fyrimunin, at hann kann nýtast á nógvum plássum, og tí var hetta heilt víst ikki seinasti landsdystur hansara.



# Ræðuligt

**Sveisisku hornaspørkini vóru einastu møguleikarnir hjá Súna Olsen at svala sær nakað fyri steðgin, tá hann annars rant runt í bakandi sólini á St. Jacobs leikvøllinum**



*Súni Olsen ivast ikki í, at føroyska avrikið fer at verða betri mikudagin*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Basel, Sveis:** Soleiðis sum uppstillingin var til dystarbyrjan, so var tað Súni Olsen, sum fekk óhepna leiklutin á vinstra bakki, har sólin bakaði niður.

Hinumegin var skuggi og nakað væl svalligari, og Súni viðgekk eisini, at hetta hevði verð strævið.

– Eg var rættiliga heitur. Eg haldi ongantíð, at eg havi spælt í slíkum hita fyrr. Einasta hjálpin var, at eg onkra tíð kundi sleppa mær í skuggan, tá teir høvdu hornaspark, men í aðrar mátar bakaði sólin niður alla tíðina.

*So tú gleddi teg kanska til hálvleikin?*

– Tað veit eg ikki. Jú, soleiðis sum støðan í dystinum bleiv, so kom steðgurin væl við. So kundu vit fáa nakað av luft.

Spurdur, hvørt komandi dysturin móti Fraklandi kundi eiga sín leiklut í, at føroysku leikararnir ikki tóktust klárir, tá dysturin byrjaði, helt Súni, at tað var ikki talan um.

– Eg haldi sjálvur, at menn tóktust vera klárir. Tað var kanska meira tað, at teir fáa sítt fyrsta mál bara sekundir eftir, at vit hava havt ein risamøguleika. Tá fara vit niður við høvdinum, og tað má ikki henda.

– Eg haldi heldur ikki, at vit vóru undir so stórum trýsti, men teir vóru rættiliga effektivir. Eg haldi, at teir hava einar níggju upplagdar møguleikar, og teir skora so upp á einar seks av teimum.

Og tá vit at enda spurdu Súna, um tað fór at verða tungt hjá føroyska liðnum at reisa seg, helt hann, at støðan ikki verður verri.

– Teir hava nokk betri leikarar enn Sveis, men tá eru vit á heimavølli, og veðrið verður kanska meira til vildar fyri okkara viðkomandi. So eg ivist ikki í, at tað fer at verða nakað væl betri til tann dystin.

# Jónhard var kløkkur

**Sjálvur hevði framherjin als ikki roknað við møguleikanum, sum hann fekk boð um leygarmorgunin**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Basel, Sveis:** – Hasum hevði eg ikki roknað við. Men eg setti mær bara fyri, at nú mátti eg gera mítt allarbesta.

Soleiðis svaraði Jónhard Frederiksberg, sum kanska var ein av fáu føroyingunum, sum kundi smílast eitt sindur eftir dystin. Boðini um uppstillingina hevði hann fingið frá venjaranum um morgunin, og hann viðgekk, at hann var eitt sindur kløkkur.

– Eg mátti so bara seta meg upp til dystin sum frægast, og so vóna tað besta.

Nú endaði dysturin við einum greiðum tapi, men av føroysku leikarunum var Jónhard avgjørt í frægara endanum, og sjálvur helt hann so heldur ikki, at hann hevði spælt seg av liðnum.

– Har var ein øgiligur hiti, og vit skuldu renna nógv, so tað var strævið. Men eg haldi kortini, at tað var á eini leið, sjálvt um 6-0 sjálvandi ikki er nakað nøktandi úrslit. Tann parturin kundi so gingið betri.

*Verður tann parturin betri mikudagin?*

– Tað vóni eg. Í øllum førum mugu allir, sum tá byrja inni, fara út at gera sítt besta, og so fáa vit at síggja, helt altso Jónhard Frederiksberg at enda.



*– Har var ein øgiligur hiti var fyrsta viðmerkingin hjá Jónhardi um sjálvan dystin*

# Vil hava plássið aftur

**– Tað nyttar jú einki at ganga runt og vera fornermaður, um tú ikki byrjar inni. Eg fór inn fyri at gera mítt besta, segði Rógvi Jacobsen, sum hevur vónina um, at hann sleppur at byrja á vøllinum mikudagin**



*Rógvi Jacobsen helt eftir dystin, at tað hevði verið frustrerandi at síggja, hvussu illa føroyska spælið koyrdi*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Basel, Sveis:** Ein av broytingunum á føroyska liðnum til dystin leygardagin var, at Rógvi Jacobsen nú var at finna á beinkinum, eftir at hann annars hevur átt fast pláss á liðnum í gott ár.

Sjálvur viðgekk Rógvi eisini, at hetta var eitt vónbrot, tó at hann ikki var heilt skelkaður.

– Eg hevði ein varhuga av tí, nú pláss skuldi skapast fyri Claus Bech Jørgensen.

Tá hann so kom inn á vøllin, so var tað heldur á miðvøllinum, men heldur í álopsplássinum, sum hann hevur røkt í HB, og sjálvur helt Rógvi, at hetta gekk á eini leið.

– Tað nyttar jú einki at ganga runt og vera fornermaður, um tú ikki byrjar inni. Eg fór inn fyri at gera mítt besta, og serliga royndi eg at fáa tað defensiva upp á pláss, og tað gekk so nøkunlunda, haldi eg. Teir skoraðu í øllum førum ikki, tá eg var inni, segði Rógvi, sum tó mátti síggja bæði fimta og sætta sveisiska málið fara inn, meðan hann gjørdi seg til reiðar at koma á vøllin.

Og roknar tú so við, at tú í dag gjørdi nóg mikið, til at vinna plássið hjá tær aftur.

– Tað var so tað, sum eg royndi. Tað var eisini frustrerandi at síggja, hvussu illa spælið gekk. Eg royndi so at gera mítt, og so mugu vit síggja, um tað er nóg mikið. Tað vóni eg í øllum førum, segði Rógvi Jacobsen at enda.


Til urtagarðin



Snjóklokka

Ymisk sløg av blómuleykum

Mánadag - fríggjadag kl. 13.00-18.00
Leygardag kl. 11.00-14.00
Annars eftir avtalu

Hanne-Dot
Landavegur 38 · 100 Tórshavn · Tel 215950